Vikuskifti

Nr. 77 • fríggjadagur • 21. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bara Kim á Summar Festivalinum



*Líka síðan Kim Hansen sang Elton John og Billy Joel sangir á eini Útvarpskonsert í 1992, hevur hann trøllabundið føroyska lurtaran við síni frálíku rødd*

Kim Hansen verður eitt av føroysku høvuðsnøvnunum á Summar Festivalinum, tá risastóra tónleika tiltakið verður hildið í Klaksvík á triðja sinni

FESTIVAL SUMMARIÐ

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í dag varð enn eitt stórt tónleikanavn avdúkað á Summar Festivalinum. Frammanundan er greitt, at tey trý útlendsku nøvnini Shu-bi-dua, The Rasmus og Roger Hodgson spæla, men hóast dagsins navn er føroyskt, er hetta heldur ikki hvør sum helst. Ársins sangari 2005, Prix Føroyar finalistur í 2005, Prix Føroyar vinnari í 1995 og 1999, ársins klaverleikari 2004, og millum manna best umtókti sangari í Føroyum. Við øðrum orðum Kim Hansen.

### Mest selda fløga í 2005

Kim Hansen hevur seinastu fimtan árini gjørt vart við seg sum sangari í og klaverleikari í bólkum sum Jóannes og Co., Kim og Co., Moirae, Taxi, Rekini og Showmonnum, úrslitið av hesum kom út á tví-fløgu í fjør, undir heitinum Kim Hansen – Alt.

Fløgan gjørdist sera væl umtókt, og var mest selda fløga í Føroyum í fjør. Á Summar Festivalinum í ár verður møguleiki, at hoyra nøkur av hesum løgum og onnur nýggjari Kim løg, tá Kim Hansen endiliga fer á palli undir egnum navni og við egnum bólki. Hetta er sostatt hvørki Showmenn, Taxi ella Co. men bara Kim.

### Ikki Showmenn

Kim leggur dent á, at tá Kim Hansen fer á pallin á Summar Festivalinum, verður talan um nakað heilt annað enn Showmenn. “Showmenn er ein undirhaldsbólkur, ið spælir til dans, vit eru kanska ein góður dansibólkur, men vit eru ein dansibólkur”, sigur hann. “Kim Hansen á fløgu er fyrst og fremst egin løg, og á konsertini á Summar festivalinum spæla vit somuleiðis bara mín tónleik, og hetta er ein konsert og ikki ein dansur, tað er størsti munurin”.

Kim hevur sjey tónleikarar afturat sær í bólkinum, ið fer á pallin í Klaksvík, og at her verður m.a. talan um blásarar, ið fara at gera ljóðmyndina enn meira stórsligna. “Vit fara at royna at gera konsertina eitt sindur serliga og gera tí eitt sindur eyka burturúr.”, greiður hann frá, men vil ikki avdúkað nakað konkret um hvat hetta inniber.

### Nýggj Kim fløga

Kim hevur í longri tíð arbeitt við at skriva tónleik til fyrstu fløgu sína við nýggjum tilfari. Okkurt av hesum tilfari fer somuleiðis at sleppa upp í part á Summar Festivalinum. Spurdur um tónleikastíl, sigur hann, at hetta er ikki kontri og vestern. Tónleikurin avspeglar Kim, har hann er í løtuni. “Tað er eingin meining í, at gera annað enn tað, sum man stendur inni fyri. Tað hevði verið eitt sindur býtt um eg ljóðaði sum t.d. 200, tí tað er ikki tað, sum eg geri.”, sigur hann. Eg geri heldur ikki tann sama tónleikin, sum eg gjørdi fyri nøkrum árum síðan, man broytist jú við tíðini, og tað er eingin meining í at berjast ímóti tí.

Kim sigur, at enn er eingin endalig ætlan løgd fyri, nær fløgan er liðug. Hann greiður frá, at hann skrivar bert løg, og tí er hann bundin av, at onnur skulu skriva tekstir til tey, og tí hevur hann ikki sjálvur fullkomiligu stýringina av nær tilfarið er liðugt.

### Ger sær ómak við spæliskránni

Í hesum døgum situr Kim og roynir at gera spæliskránna klára til konsertina, hóast nógvir mánar eru til Summar Festivalin, so eru fyrireikingarnar longu væl ávegin. Skráin verður sjálvandi merkt av teimum landaplágunum, ið Kim hevði á fløguni “Alt”, men verður kryddað við nýggjum tilfari. Kim ætlar sær at gera sær nógvan ómak, soleiðis at skraín riggar best møguligt, síðan skal hon venjast væl.

### Ársins sangari

Kim Hansen vann planetina sum besti føroyski sangari á Planet Awards í ár, og hetta var ikki uttan orsøk. Tí frá fyrstu ferð Kim traðkaði á føroyska tónleikapallin, hevur hann bergtikið við síni góðu rødd, og tað var passandi, at hann vann henda heiður hetta árið, tá hann gav sína fyrstu fløgu út.

Líka síðan Kim Hansen sang Elton John og Billy Joel sangir á eini Útvarpskonsert í 1992, hevur hann trøllabundið føroyska lurtaran við síni frálíku rødd, m.a. meðan hann tolkar júst løg hjá hesum báðum sangarum, umframt øðrum úr somu tónleikagrein. Løtan, tá Kim Hansen tolkaði lagið Englands Rose, ið Elton John skrivaði til jarðarferðina hjá Dianu prinsessu, og spældi tað í útvarpinum kvøldið fyri, at Elton John framførdi tað til jarðarferðina, verður seint gloymd.

Men í Summar Festivalinum traðkar hann endiliga úr skugganum hjá láníløgunum og ymiskum bólkum og stendur á heilt egnum beinum, sum bara Kim.